Per Gúnt hjá Grímu - eru vit ikki komin langt??

Leiklistin stórtrívist her á landi – og seinasta prógvið er Per Gúnt

Tað var ikki smávegis føðingardagsgávu vit fingu frá Grímu, nú tað eru 25 ár síðan vit fyrstu ferð sóu Kópakonuna á palli skrivar Jógvan Ósá í ummælinum av leikinum Per Gúnt, sum Gríma frumframførdi leygarkvøldið

UMMÆLI

Jógvan E. Ósá

Blaðtjak í seinastuni hevur givið einum ta fatan, at tað at ummæla, er ein vísund.

Tað "fólkaliga" ummælið hevur ongan rætt – og tú hevur bara at tiga og lata "ekspertar" ummæla, tí tað eru bara "vit", ið vita, og so skulu onnur onki siga/skriva. Tey eru jú býtt.

Við tí treyt, at eg fái eitt slag yvir fingrarnar, skal eg "allernådigst" loyva mær at siga mína meining um Per Gúnt.

Kundi ikki lata vera við at hugsa, meðan eg sá leikin. Eru vit ikki komin langt??

Leiklistin stórtrívist her á landi – og seinasta prógvið er Per Gúnt.

Tað var ikki smávegis føðingardagsgávu vit fingu frá Grímu, nú tað eru 25 ár síðan vit fyrstu ferð sóu Kópakonuna á palli.

Kendi ikki leikritið – havi ongantíð sæð leikin og eiheldur lisið tað. Men eg kenni tónleikin hjá Grieg – og hevði hoyrt okkurt um, at Per Gúnt var lygnari – stórreypari – ein íspegil – men so ikki meira.

Tá eg 12. mars í ár segði Eyðun Johannessen frá hesum, helt hann fyri við meg, at tú er "heldigur" – tí tú kemur inn í sjónleikarhølið við "tómum" høvdi – og er klárur at taka ímóti øllum við opnum sinni.

Eg gevi Eyðun rætt. Tí tað var ikki lítið av eini uppliving, ið hettar "tóma" høvdið kom út fyri, sum gjørdi, at hárini reistust á høvdinum – kalt fór oman eftir rygginum – fyri so at sveitta, sum um man var á fjalli.

Uppsetingin var bara so góð – at ein má ferð eftir ferð undrast yvir tey evni, ið Eyðun hevur fingið. Hann kann aftur og aftur kløkka okkum – og gera okkum í so góðum lag – at tú vil bara ikki, at løtan skal enda, so "pragtfult" er tað.

Ein má undrast yvir tílíkan klassikara, sum er 100 ár og meira, so kann tað framvegis siga okkum nakað – og geva okkum nógv.

Eyðun Andreasen segði tað so væl eftir leiklok. "Tað kemur av, at vit framvegis eru menniskju – við somu genum".

Eg skal ikki koma so nógv inn á sjálvt leikritið og gera meg klókan uppá tað. Tað kann onkur annar gera nógv betur enn eg, men bert hefta meg við uppsetingina – og spælið. Ella var tað spæl?? Vóru persónarnir ikki tað tey framførdu á palli?? Í fleiri førum, helt eg tað.

Fyrst er at nevna tað, at Eyðun hevði valt, at "gamli" Per Gúnt (Páll Danielsen) var fyri tað nógva á pallinum, meðan hin "ungi" Per Gúnt (Hans Tórgarð) framførdi sína søgu - og hettar helt eg verða nakað av tí besta í leikinum. Allarhelst tí at Páll Danielsen er ein av okkara allar- allarbestu sjónleikarum og hetta megnar hann, at "spæla"-uttan at siga nakað. Tað var bara so gott at síggja hansara andlitsbrøgd, tí hann vísti okkum, hvat, ið fór at henda. Vit sóu næstan beinanvegin á Pálli, um tað var gott ella ringt. Eitt nú, tá ið trøllagentan fyrstu ferð trein á pall. Tá fingu vit við skeið at vita, at nú hendi nakað, sum var nakað "lort". Genialt.

Har var trølladansur – har var fagur arabaradansur – til yndisligan tónleik av Stamen Stantchev, ja, har var bara "alt".

Havi altíð havt ringt við at nevna nakran einstakan leikara. Veit av royndum, at hetta er eitt "team" – har tann allarminsti leiklutur kann oyðileggja alt – men eisini gera upplivilsi enn størri (tað finnast ikki smáir leiklutir, bert smáir leikarar), minnast vit øll, sum eru uppvaksin í Sjónleikarahúsinum í Havn.

Tó. Vit hava áður sæð, hvussu góður Hans Tórgarð er. Og hann blívur við og við. Um hettar var tað besta, kann eg ikki siga, tí hinir leiklutirnir hava verið so góðir. Men hugsa bara um skifti frá Per Gúnt til læknan. Tað vísti, hvussu "stórur" hann er.

Ein av mínum yndissjónleikarum er Páll Danielsen. Minnist hann sum heilt ungan, tá ið hann kom á sjónleikarskeið hjá MáF. Legði beinanvegin merki til hesar gávur, ið hesin unglingi hevði. Minnist, at eg segði við hann, um at „dyrka" hesar gávur og ikki lata tær fara. Um tað vóru míni ráð, sum hann lurtaði eftir – neyvan – men tíbetur gjørdi hann av at spæla uppá "alt" klaverið – og ikki bert uppá nakrar fáar tangentar.

Í Per Gúnt vísti hann enn einaferð, hvussu góður sjónleikari hann er. Ein góð vinkona, sum var við til frumframførðsluna, segði við meg, at Páll riggar best sum "eldri" sjónleikari, og eg gevi henni rætt. Hvør minnist hann ikki í "krypilin". Góði Páll. Eg gleddist, ja, eg var bara so glaður at síggja títt spæl. Tú er avgjørt ein av teim "stóru".

Eg fari ikki at nevna øll. Men skuldi helst gjørt tað. Tí spælið var so gott, og tit eiga øll eina rósu. Men eg má nevna Kára Øster.

Havi ferð eftir ferð undrast á hansara gávur, og Kári smøddist ikki burtur. Hann var framúrskarandi. Tó kann eg ikki lata vera við at nevna hann í leiklutinum, sum knappastoyparin. Ein sá, hvussu hann nýtti tað. Har var hann í "essinum". Eitt stórt UG til tín, Kári.

Ja, góða Gríma. Tøkk fyri føðingardagsgávuna. Hon var stór – og vit koma at minnast hana leingi. Mín vón er, at okkara politikarar síggja, hvussu góð og stór okkara leiklist er. Hetta kunnu teir gera við at samtykkja Tjóðpall Føroya, so vit koma enn longri fram. TAÐ hevði verið føðingardagsgávan yvir øllum.

Skal eg siga nakað negativt, so er tað tað. At eg nú havi sæð leikin, og havi ikki tað til góðar, at síggja hann fyrstu ferð.

Men tit, ið hava tað. Tit hava nakað at gleða tykkum til. Eg eri ikki so lítið øvundsjúkur inn á tykkum.

Snarferð til Jútland
- við flogfari og leigu av bil í 2 dagar
frá kr. 2.095* t/r fyri hvønn
*Á lítli 4 farkost eftir. Ár Føroyum bíðing alla leygardag í tíðarskeiðinum 3. apríl-15. juni og 14. august-23. oktober 2003.
Flogfelag Føroya, Tórshv. 345000, Fingu 345000, travel@ff.fo
Faroe Plus, 352333, faroeplus@faroeplus.fo
MB Tours, 321121, mb@mb.fo
Faroe Travel, 312080, faroetravel.fo
MAERSK AIR
it's get to be perfect

ítróttur
Nr. 58 • týsdagur • 25. mars 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

KÍ-EB/Streymur 0-4 (0-3):

Endurvaktir marrudreymar

Enn einaferð fekk KÍ eina vána byrjan upp á kappingarárið, tá EB/Streymur við søguligu trygga 4-0 tók alt við sær

LØGMANSSTEYPIÐ
Jákup Mørk

Hóast tað vóru vertirnir, sum høvdu bóltin meira, so megnaðu teir ikki at gera stóvegis við EB/Streym, sum vunnu ein tryggan sigur í fyrsta dystinum í bólkaspælinum
Mynd: SáH

Norðoyastevnan 2001 verður neyvan gloymd í hugaheiminum hjá fótbóltshugaðum klaksvíkingum. Tað var nevnliga ta ferðina, at uppflytararnir úr EB/Streymur gjørdu bart, og vunnu ikki minni enn 4-0 á einum KÍ-liði, sum hóast eina trupla kappingarbyrjan avgjørt ætlaði at reisa seg í hesum dystinum.

Í fjør mundi tað fyri KÍ kennast sum eitt slag av endurtøku, tá teir tvær ferðir í steypakappingini máttu lúta fyri uppflytarunum av Skála, og í ár var tað so aftur EB/Streymur, sum órógvaði. Og tað enntá aftur í Klaksvík.

Vórðu revsaðir

Og sum skilst á lagnum, so var tað eisini fult uppiborið, at EB/Streymur fekk øll stigini við sær. Kanska vóru tað klaksvíkingar, sum høvdu bóltin meira, men teir megnaðu ikki at skapa tað stóra, meðan tað hinvegin var vandi á ferð, tá EB/Streymur setti ferð á.

Longu undan fyrsta málinum hevði Karsten Joensen stórbjargað eina ferð, men tá hornaspark seinni varð sent innfyri, var hann prísgivin. Bólturin fann vegin á kollin hjá Egil í Bø, sum uttan stórvegis iva stútaði inn.

Og so gjørdust fortreytirnar hjá EB/Streymi at spæla kontra-bólt uppaftur betri. Serstakliga vóru Magni á Lakjuni í Sorin Anghel væl upplagdir, og tað vóru eisini júst hesir, sum stóðu aftan fyri næsta málið, tó at vertirnir eisini hjálptu til.

Eitt heldru óskettið bólttap førdi til, at Magni varð spældur júst í røttu løtuni, soleiðis at rangstøðan ikki fangaði hann, og tá málverjin kom út, rullaði hann tvørtur um til Sorin, sum hevði alt málið fyri sær. Og stutt undan steðginum var Sorin aftur upp á spæl, tá hann kom at standa mest sum púrasta leysur í KÍ-brotsteiginum. Aftur her eftir ósketni í uppspælinum hjá KÍ, soleiðis at mótstøðan kundi fanga teir á skeiva beininum.

Royndu at trýsta

KÍ liðið hevði nakað av trupulleikum undan dystinum, tí Alexander Djordjevic var burturstaddur. Hetta noyddi teir at umskipa bæði miðju og álop, og tað var greitt, at hetta órógvaði nakað.

Seinna umfarið broyttu teir aftur liðið nakað, og eina løtu sá kanska út til, at hetta bøtti um. Við tryggu leiðsluni lótu gestirnir nú mest sum alt spælið til KÍ, sum eisini fekk í lag eitt veruligt trýst. Verjan hjá EB/Streymi við Andrzej Pacek og Egil í Bø sum skiparum, fekk tó fatur á tí allarmesta, og tá klaksvíkingar so eina ferð fingu ein góðan møguleiki, fór annars harða skotið frá Eyðuni Klakstein strúkandi væl framvið málinum.

Og so hendi tað, sum tað so ofta ger, tá annað liðið leggur nógv fyri í álopspartinum. Gestirnir vunnu bóltin á miðvøllinum, og so setti Marek Wierzbicki ferð á móti tunnu verjuni. Hann sneiddi ein leikara av sær, og ísakaldur mest sum legði hann bóltin inn við nærmaru stong, soleiðis at sigurin varð mest sum sementeraður.

Og í øllum førum fekk EB/Streymur eitt gott útgangsstøði til bólkaspælið við sigrinum. Komandi vikuskifti eiga teir aftur útidyst, tá teir vitja á Argjum, og kann tann dysturin geva trý stig, fer av álvara at síggja ljóst út. Tá skal KÍ til Vágs at royna seg.

Dysturin í tølum

KÍ-EB/Streymur 0-4 (0-3)
0-1: Egil í Bø
0-2: Sorin Anghel
0-3: Sorin Anghel
0-4: Marek Wierzbicki

FS Vágar fingið høvuðsstuðul

Vatnsoyra Snikkaravirki verður høvuðsstuðul hjá FS Vágum. Avtala varð undirskrivað leygarmorgunin

SPONSORAVTALA
Edvard Joensen

Vatnsoyra Snikkaravirki og FS Vágar hava avtalað,at Snikkaravirkið verður høvuðsstuðul hjá FS Vágum. Hvat avtalan gevur í peningi, vilja partarnir ikki upplýsa.

Heðin Poulsen, sum vegna Vatnsoyra Snikkaravirki skrivaði undir avtaluna, sigur, at fyritøkan nú fær ein góðan møguleika at lýsa við síni framleiðslu, sum í høvuðsheitinum er H vindeygað, ið eisini verður tað, sum fer at mynda leikbúnarnar hjá FS Vágum.

– Vit hava altíð hildið, at tað er rætt at stuðla ítróttinum í oynni, og nú hava vit valt at gera hesa avtaluna, sum vónandi fer at geva báðum þartum nakað, sigur hann.

Formaðurin í FS Vágum, Árni Jacobsen, fegnast um avtaluna. Hann er serliga fegin um, at tað er eydnast at fáa ein høvuðstuðul úr oynni.

FS Vágar hevur eisini aðrar stuðulsavtalur ávegis. Eitt nú fer Sandavágs Timburhandil og Kovin framvegis at hava síni búmerki á venjingarbúnunum hjá fótbóltsliðnum í fyrstu deild. Aðrir stuðlar fara at lýsa á búnunum hjá yngru deildunum. Sum til dømis Restorff's bryggjarí, har SISU og ASSU fara at síggjast á leikarabúnunum.

Tað verður Vatnsoyra Snikkaravirki, sum komandi kappingarárið fer at prýða búnarnar hjá FS Vágum
Mynd: Edvard Joensen